## Framvegis ikki fræls

Í gjár vóru trý ár liðin, síðani tann eysturríkska gentan Natascha Kampusch slapp til rýmingar úr kjallaranum hjá Wolfgang Priklopil, sum hevði havt hana sum fanga har í meiri enn átta ár. Men Narascha Kampusch kennir seg framvegis ikki hava fingið frælsi. Við eysturríkskar og týskar fjølmiðlar sigur hon, at hóast trý ár eru liðin, síðani hon slapp útaftur, at situr hon rættiliga nógv inni hjá sjálvum og fær tíðina at ganga við at lesa, tekna og at taka myndir. Við týska blaðið Süddeutsche Zeitungsigur hon, at lívið er ikki so gott, sum hon hevði ímyndað sær.



## Tríggir duttu oman

Trý fólk doyðu, tá tey duttu oman í teimum italsku Alpunum í gjár. Talan var um tríggjar einstakar vanlukkur. Tann 32 ára gamli fransmaðurin Gerard Durand doyði, tá hann datt oman á tí kenda fjallinum Matterhorn. Hann var komin 4.200 metrar niðan, tá hann datt oman italsku megin fjallið. Um somu tíð datt ein maður oman, tá hann royndi at sleppa niðan á Aiguille Noire, sum er ein tindur á Mont Blanc. Tann triði tilburðurin var á italska fjallinum Pasubio, har ein 75 ára gamal maður datt oman og doyði.

# lættari

tað at kenna avbjóðingar og mótgang er ein meira sjálvsagdur lívslutur innan sjó- og fiskivinnuna enn í øðrum vinnugreinum.

- Henda vinna er meira beinleiðis tengd at náttúruni og teimum alstóru broytingum, ið har eru. Samstundis er henda vinna tengd at altjóða marknaðarráki, ið kanska eru eins broytilig og náttúran.

Hann segði, at eyðkenni fyri náttúru og altjóða pallin er, at hesi ávirka okkara vinnu almikið, meðan møguleikarnir hjá vinnuni at ávirka tey, eru so at siga eingir.

- Tí er kynstrið hjá vinnuni og tykkum sjófólkum altíð tað sama – at megna at tillaga seg støðugt broytandi umstøðum, legði hann aftrat.

### At reisa seg

Jacob Vestergaard ásannaði í síni setanarrøðu, at greinar av samfelag og vinnu okkara eru í kreppu, og at kreppan kann kennast tung, har hon rakar.

- Men nógvar vinnugreinar hvíla á góðum grundarlagi, eitt nú tí, at marknaðarprísir hava hildið sær, eins og at framleiddu nøgdirnar eru stórar. Tað er tí mín størsta vón, at smidligar flytingar av arbeiðsorku millum vinnugreinar er ein veruleiki, soleiðis at yrkismøguleikar standa fólki í boði, tá afturgongd í teirra vinnugrein gerst veruleiki, legði hann aftrat.

Landsstýrismaðurin vísti á, at í langtíðarhøpi er afturgongd í vinnu og búskapi okkara ikki nakað nýtt fyribrigdi.

- Øll minnast kreppuna í nítiárunum, og flestu okkara hava lisið um líknandi kreppu í fimmtiárunum. Søgan hevur tó lært okkum, at vit reistu okkum aftur, sjálvt um hesar kreppur vóru munandi størri, enn afturgongdin er í dag. Tískil kunnu tær kreppurnar als ikki samanberast við dagsins støðu. Tær vinnugreinar og fólk, sum hava verið fyri afturgongd, fara heilt vist at finna nýggjar møguleikar, sum kunnu tryggja grundarlag fyri mennandi framtíðarleið, sum hann tók til.

### Tøk takast

Í síni setanarrøðu nevndi Jacob Vestergaard eisini nýggju Norðborg, sum er nýggjasta og mest framkomna skip í føroyska fiskiskipaflotanum.

- Við hesi verkætlan hava norðoyingar prógvað, at teir standa í fremstu røð, tá nýggjar leiðir skulu troytast. Tøk kunnu takast, og eingin orsøk er at halda, at okkurt takið ikki verður tikið aftrat, soleiðis at vøkstur aftur kann síggjast innan nýggj øki. Við tí dirvi og tí áræði, sum er í fólkinum, ivist eg heldur ikki í, at umstøðurnar skjótt fara at gerast betri, legði hann aftrat.

Landsstýrismaðurin nam eisini við grundarlagið undir allari fiskivinnu, sum eru fiskastovnarnir.

- Vit vita, at nakrir fiskastovnar eru á einum lágum støði í dag, men tað er mín avgjørda sannføring, at stovnar okkara eru væl vardir, og at grundarlag er fyri, at teir fara at veksa aftur, tá náttúruviðurskiftini eru við okkum. Mínar lívsroyndir hava lært meg, at náttúran ikki bert borgar fyri afturgongd, men eisini fyri framgongd, ið lyftir okkum upp á tindar – úr djúpum dølum. Slík framgongd fer at koma, og tað er bara ein spurningur um tíð, segði Jacob Vestergaard, tá hann setti Føroya Sjómannadag í Klaksvík.



*FM-vinnarin, John Havn, við kekki á 10.000 krónur. Vinstrumegin stendur Martin Simonsen og høgrumegin, vinnarin í fjør, Elmar Rubeksen*

*Mynd: Dávur Winther*

# Eingin tekur John í egning

**Á sjómannadegnum í Klaksvík varð skipað fyri nógvum ymiskum kappingum, og í blaðnum í dag nevna vit kappingarnar í ávikavist egning, agnskering og í trolbøting**

SJÓMANNADAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

John Havn sló øll met, tá hann leygarkvøldið vann á øllum hinum luttakarunum í FM-kappingini í egning.

Besta tíðin, sum verið hevur, síðan Føroya Sjómannadagur sá dagsins ljós fyri fimm árum síðan, var 7,41 minuttir. Hesa tíðina átti John Havn. Men í fjør var tað Elmar Rubeksen, sum gjørdist vinnari og meistari.

### John setti met

Í kappingini leygardagin egndi John Havn 100 húkar og knýtti fimm teymar undir línuna upp á 6.42.78 minuttir. Hetta er besta tíð, sum nakar hevur havt í egning á sjómannadegnum.

Á øðrum plássi endaði Elmar Rubeksen, sum brúkti tíðina 7.24.78 og á triðja plássi Martin Simonsen við tíðini 7.35.69 minuttir.

Tilsamans 10 luttakarar vóru við í kappingini og tann, sum brúkti longstu tíðina um hesar 100 húkarnar, hevði 10.10.30 minuttir.

Við í kappingini vóru bæði yngri og tilkomnir menn.

Millum luttakararnar var eitt nú gamli KÍ-málverjin, Jógvan Linklett og fyrrverandipresturin, Andreas Andreassen av Toftum, sum seinastu árini hevur róð út við útróðrarbátinum Majken.

Onnur ár hevur verið vanligt at egna nýggja línu, men í ár gjørdu fyrireikararnir av at brúka gamla - ella brúkta - línu, sum egnarar halda er lættari at egna enn spildurnýggj lína, sum ongantíð hevur verið í sjónum.

Hetta kann vera ein orsøk til, at tiðirnar hjá kvikastu egnarunum í dag vóru so góðar.

### Skjótasti agnskerari

Hóast nógvir dugnaligir agnskerarar finnast í Norðoyggjum, meldaðu bert fýra luttakarar seg til kappingina í agnskering.

Millum teir fýra var tað soleiðis bert hin eini, sum ikki fekk heiðurpláss millum tríggjar teir bestu. Teir brúktu millum 1.32.67 og 4.37.46 minuttir um at skera.

Kvikastur og FM-vinnari gjørdist Jógvan Heinesen við tíðini 1.32.67, á øðrum plássi Klávus Bjartalíð við tíðini 1.51.98 minuttir og á triðja plássi Petur Martin Sivertsen, sum hevði tíðina 1.56.35.

Petur Zachariassen royndist eisini óførur, tó at hann brúkti nakað longri tíð enn hinir tríggir.

### Kvikasti trolbøtari

Tilsamans 14 mans bjóðaðu seg fram í kappingini í trolbøting.

Sjey net hingu uppi í senn, og tí varð neyðugt við tveimum umførum - við sjey monnum í hvørjum umfari.

Tá allir 14 høvdu roynt seg, var úrslitið, at strandingurin, Jan Højgaard, var kvikastur og fyrstur liðugur við sítt net. Á øðrum plássi kom Marner Sivertsen, og honum á baki og á triðja plássi Petur Martin Sivertsen.

Jan brúkti tíðina 3,39,27, Marner 4,18,17 og Petur Martin 4,58,14 minuttir.

Maðurin, sum hevði longstu tíð um sítt net, brúkti 7,47,32 minuttir.

# Sjónlig fiskifrøði



*...um Magnusi Heinason, sum lá á Klaksvík*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

SJÓMANNADAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er vorðið meira vanligt, at almennir stovnar hava hug at vísa seg frá eini aðrari - og meira "opnari" síðu - enn teir áður hava gjørt. Hetta er líkasum vorðið partur av einum nýggjum samleika.

Tá fiskivinnuframsýning var í høvuðsstaðnum fyrr í ár, hevði Havstovan bás á framsýningini.

Nú sjómannadagur var í Klaksvík í dag, hevði Havstovan Magnus Heinason liggjandi í Klaksvík, har fólk høvdu høvi at vitja umborð.

Umborð á skipinum fingu áhugaði at vita, hvussu ymisk kanningarúrslit verða fingin til vega, og eisini vórðu ymisk filmsbrot víst.

Fólk fingu kunnleika um ymisk fiskasløg, hvat fiskur etur, og hvørja útgerð Magnus Heinason brúkar í sínum kanningum.

Havstovan nýtti eisini hetta høvi at siga frá um ætlaða havrannsóknarskipið.